# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Mannarættindadagur – tendrið eitt ljós

Í dag 10. desember er altjóða mannarættindadagur. Hesin dagur verður hildin kring allan heimin og er tað vorðin siður at tendra eitt ljós henda dag. Amnesty International Føroya deild sigur m.a. soleiðis í skrivi: "Vit tendra eitt ljós fyri teimum, sum ikki blivu bjargað" og vísir til orðini hjá Peter Benenson stovnara av Amnesty International.

Ì hesum sambandi heitir felagsskapurin á føroyingar um at tendra eitt ljós, annaðhvørt heima við hús, á arbeiðsplássinum ella har, ið til ber.

Til ber eisini at tendra ljós saman við øðrum í nýggja bygninginum Perluni í Tórsgøtu, har Amnesty Café verður seinnapartin í dag.

Á Amnesty Café verður m.a. høvið at skriva eina heilsan til Birtukan Mideksa. - Birtukan Mideksa er leiðari í einum andstøðuflokki og situr í Kaliti fongslinum í Addis Ababa í Etiopia. Hon er dømd at sita fyri lívstíð. Amnesty International metir, at hon er ein samvitskufangi, sum er dømd fyri á friðarliga hátt at nýta sítt talufrælsi og sítt frælsi til at savnast í ein felagsskap.

Tað er gott, at vit hava Amnesty Felagsskapin, sum miðvíst og ótroyttiliga stríðist fyri mannarættindum í øllum heimsins londum. Felagsskapurin hevur líkasum verið flaggskipið hjá øllum teimum felagsskapum, feløgum og einstøkum persónum, sum hava fremst í sínum boðskapi og skjøldi at bøta um mannarættindini kring heim.

Brot á mannarættindi er so nógv. Tað hendir hvønn dag í tí smáa og í tí stóra. Tað eru risatjóðir, sum als ikki halda heilt grundleggjandi mannarættindi, og tað eru eisini lond við fólkaræði, har mannarættindini verða sett til viks. Vit kunnu nevna lond sum Kina og Burma. Men eisini um okkara leiðir. Eitt tað grovasta brotið á mannarættindi finst nevniliga í heimsins størsta demokratii, USA, har deyðarevsing er gerandiskostur.

Og júst I hesum døgum kenna vit føroyingar sviðan av, at mannarættindi verða brotin. At Skálaberg er rændur og hildin aftur av russum er einki minni enn brot á mannarættindini.

Latið okkum øll lurta eftir Amnesty og tendra eitt ljós. Tankar okkara fara í hesum sambandi eisini til manningina á Skálabergi.

**Sosialurin**

## DIS-inntøka og blokkur

**HELGI STRØM**
útisiglari, Trongisvági

Fyrst vil eg nýta høvi at takka Dennis Holm og Magna Laksafoss fyri tykkara valaarbeiði, har tit hegnisliga lýsa og staðfesta fyri Føroya fólki og landsins stjórn týdningin av DIS -, NIS - og øðrum uttanlandsinntøkunum. Og eg vil eisini takka Magna Laksafoss, at hann í Degi & Viku gjørdi greitt, at DISsarar gjalda fullan skatt av teirra inntøku. Útisiglarar eru ein útflutningvøra - vøran er arbeiðsmegi.

Nakrir fyrimunir av DIS, NIS osv.:

**1:** 320 mió er inntøka sum kemur beinleiðis inn í landið - bøtur um bruttotjóðarinntøkuna - inntøkan verður nýtt í samfelagnum, ella sett í føroyskar peningastovnar, sum so verða til nyttu har.

**2:** Okkara pension verður til ta tíð skattað í Føroyum.

**3:** Atlantic Airways, sum landið enn eigur 67% av, fær nakað inn í ferðaseðlum, tað kundi verið áhugavert at sætt nøkur tøl frá AA - Leysliga vil eg meta, at hesir knappliga 1000 sjómenn fylla eini 60 full flogfør árliga tur-retur. Tá hesir ferðaseðlar kunnu roknast at vera millum heimsins dýrastu pr. fjórðing, so er tað helst ikki so lítið.

Í D&V fíggjakvøldið hin 4. des. varð ført fram, at DIS ikki hevur eins stóran týdning og blokkurin.

Hetta ljóðar ógvuliga undrunarvert, tí líka síðan sjálvstýrissamgongan sat, hevur verið stríðst við at minka um blokkin - tað er bert Sambandsflokkurin, sum hevur stríðst ímóti.

Tað er rætt at FAS er okkara egna ábyrgd, men eg dugi ikki rættiliga at síggja at tað er so stórur munur. Sum er gjalda FASararnir skatt, men so velja Føroyar at geva skipum/reiðarum, sum eru undir FAS, skattin aftur.

Í DIS verður eitt lið lopið um - tvs. at vit gjalda skattin beinleiðis til reiðaran. Kundi eisini verið áhugavert at vita hvussu nógvir føroyingar sigla undir FAS.

**Blokkurin**

Um dissararnir gjalda kommunuskatt ella ei, er ein spurningur um raðfesting av landsins leiðslu. Um rætt varð atborðið, so varð tann parturin uml. 225 mió, sum svarar til 50% í skatti av tí DISsararnir tjena, oyramerktur í blokkinum og ikki róptur stuðil, sum jú skurrar í flestum oyrum. Heldur skuldi tann parturin av blokkinum verið kallaður útjavningargjald (udligningsbeløb), og markaður sum DIS-skattur.

Kommunurnar skuldi fingið tað í kommunuskatti, sum svarar til tað talið av dissarum, sum eru í kommununi, buturav hesum 225 mió - Kommunurnar høvdu ikke verið við skerdan lut og vit útisiglarar kundi følt okkum væl í egnum landi.

Tað er rætt, at vit skulu forhandla við donsku stjórnina - vit kunnu lata vera við at lækka blokkin ella møguliga hækka hann við hesum 225 mió. Og samstundis kanna um tað er annað í blokkinum sum kann koma undir avgjald heldur enn stuðil.

Mannarættindadagur:

## Tendrið eitt ljós

- Vit tendra eitt ljós fyri teimum, sum ikki blivu bjargað, segði Peter Benenson, stovnari av Amnesty International.

Í dag 10. desember er altjóða mannarættindadagur og heitt verður á fólk at tendra eitt ljós, annaðhvørt heima við hús, á arbeiðsplássinum, ella har ið til ber.

Amnesty International Føroya Deild sigur, at til ber eisini at tendra ljós saman við øðrum í nýggja bygninginum Perluni í Tórsgøtu, har Amensty Café verður seinnapartin í dag.



Á Amnesty Café verður m.a. høvið at skriva eina heilsan til Birtukan Mideksa. - Birtukan Mideksa er leiðari í einum andstøðuflokki og situr í Kaliti fongslinum í Addis Ababa í Etiopia. Hon er dømd at sita fyri lívstíð. Amnesty International metir, at hon er ein samvitskufangi, sum er dømd fyri á friðarliga hátt at nýta sítt talufrælsi og sítt frælsi til at savnast í ein felagsskap.

**Lag: Vi er festere her for en tid**

Tú ert festari her eina tíð
og má pløga Guds akrar við stríð';
tað er frøi,
um tú sáar í grýtutum bøi.

**2.** Strevið dagsverk man tyngja títt sinn,
tungligt arbeiði roðar tín kinn;
dagin langa,
onga stund fyri einki vit ganga!

**3.** Hvassir steinar her skera í hæl,
tað er tunggongt um fjøll og um dal;
onga gleði
kennir hann, sum ei grætur á vegi.

**4.** Um tú sáar Guds orð tína leið,
skal tað blóma ein dag har, tú steig;
alt, teg tyngir,
hvørvur burtur, tá lovsong tú syngur.

**5.** Ja, várt lív verður signað og trygt,
tá á gudsorðið tað verður bygt;
gakk við treysti,
um tú sjálvur ei síggja skal heystið.

*Kristian Østergaard. John S. Myllhamar 1987.*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.